WWW.SMYRIL-LINE.COM




**Søkt verður eftir leiðara til Flogdeildina hjá Smyril Line**

Smyril Line søkir leiðara til flogdeildina á høvuðsskrivstovu okkara í Tórshavn at taka við skjótast til ber.

Flogdeildin er ein sjálvstøðug eind, ið veitir tænastur til tey av viðskiftafólkum okkara, ið ynskja at ferðast við flogfari. Tað snýr seg um bílegging av flogferðaseðlum (til rutu- og leiguflogfør), og møguliga bílegging av tokferðaseðlum og hotellgisting í samband við ferðina.

**Leiðarin á flogdeildini hevur ábyrgdina av:**

- Avgreiðslu av viðskiftafólki á skrivstovuni og um telefonina
- Skipan av starvsfólki á flogdeildini
- Útvegan av ferðaseðlum
- Avrokning við BSP/Flogfeløg o.s.fr.

Vit vænta, at tú ert tænastuhugað/ur, ágrýtin, sjálvstøðug/ur, og at tú hevur royndir við nýtslu av bíleggingarskipanum til flogfør (vit nýta Amadeus-skipanina). Vit leggja dent á, at tú eisini hevur førleika til at menna starvsfólkini.

Leiðarin kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við leiðslubólkin á sølu & marknaðardeildini, og vit vænta, at tú hevur góð samstarvsevni.

Lønarsáttmáli við atliti til útbúgving og persónligan førleika.

Umsóknarfreistin er týsdagur 13. apríl 2004. Umsókn, prógv og onnur skjøl skulu sendast til:

*Smyril Line*
*Postsmoga 370*
*FO-110 Tórshavn*

Merk brævið »Leiðari á flogdeildini«

Ella við t-posti til ***njk@smyril-line.fo***

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sølu- og Marknaðarstjóra, Niels Kreutzmann, á tlf. 345939.

J. Broncks gøta 37 · Postsmoga 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · office@smyril-line.fo




RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 264,
P/F Rasmussen & Weihe,
100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar:
18.02.2004
Nýtt navn: P/F 17. november 1979
Endamál: Endamál felagsins er at eiga og reka fasta ogn, handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 5. apríl 2004

Kristin Balle



Hestprent gevur pappírinum betri flog

HESTPRENT

## Avlýsing av fotoframsýning

Vegna forfall er fotoframsýningin, sum skuldi verða við Gjógv, avlýst.

**Pól H. J.**

## Mazda B2500 til sølu

Vegna tryggingarfelagið Trygd selja vit skaddan Mazda B2500 4x4 pick up. árg. des. 2003.

**Berg Motors, tlf. 313535**

Skeiðsdepilin — FØROYA HANDILSSKÚLI — TEKNISKI SKÚLIN

## BUSINESS ENGLISH

**Endamál:**
Endamálið og innihaldið í skeiðnum er at styrkja tín førleika í at tosa enskt meira raðið.

**Innihald:**
· gera fundaravtalur um telefonina
· duga at orða teg og svara vanligum spurningum á enskum
· duga at nøkta serstakan tørv hjá kundum og fáast við truplar kundar
· gera ein bókling á enskum, sum lýsir tína vøru o.s.fr.

**Málbólkur**
Skeiðið er ætlað starvsfólki í tænastufyritøkum og almennum stovnum.

| | |
|---|---|
| **Tíð:** | 21 tímar - kl. 15.00-17.30 |
| **Dagar:** | 28. apríl, 5., 12., 19. og 26. mai, 2. og 9. juni |
| **Skeiðleiðari:** | Lynn Reveal |
| **Kostnaður:** | 3.270,00,00 kr. |
| **Tilmelding:** | áðrenn 21. apríl 2004 |

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374,
info@skeidsdepilin.fo, www.skeidsdepilin.fo

Skeiðsdepilin — FØROYA HANDILSSKÚLI — TEKNISKI SKÚLIN

## Enskt
### fyri altjóða ferðavinnu

Enskt fyri altjóða ferðavinnu er eitt skeið fyri starvsfólk í ferðavinnuni og fyri fólk, sum ynskja at fáa sær yrkisførleika í ferðavinnu á mið- og hástigi.

Frálæran fer fram í samrøðum, og skeiðsluttakararnir fáa gjøgnumgingið málláeru saman við orðalagi og virkismáli, sum tey kunnu brúka beinleiðis í starvi teirra.

**Innihald:**
· at ráðgeva viðskiftafólki
· at viðgera klagur
· at skipa fyri útferðum

Øll hesi miða ímóti at menna førleikarnar hjá luttakarunum at tosa, lurta, lesa og skriva.

| | |
|---|---|
| **Tíð:** | 15 tímar - kl. 16.00-18.45 |
| **Tíðarskeið:** | Apríl: 21; 28. og mai 5; 12; 19. |
| **Skeiðleiðari:** | Alex Ocampo |
| **Kostnaður:** | 2.000,00 kr. |
| **Tilmelding:** | **áðrenn 16. apríl 2004** |

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374,
info@skeidsdepilin.fo, www.skeidsdepilin.fo



# HEILSANIR



**Góði fitti Høgni!**
Hjartaliga tillukku við 14 ára føðingardegnum 2. páskadag og við konfirmatiónsdegnum, sum var pálmasunnudag. Hetta smakkaði væl, ha? Jesuspápi signi lívsleið tína. Tey allarbestu ynski frá okkum her norðuri.
**Abbi og omma**



**Allarbesta mostur!**
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum í gjár. Vit eru so góð við teg.
**Heilsan Pætur og Anna Helena**



**Góði elskaði Herluf**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum. Jesuspápi veri hjá tær
**Ynskir omma í Tjørnuvík**



**Góði elskaði Herluf**
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum. Vónandi fært tú ein stuttligan dag. Vit elska teg so nógv.
**Kærar heilsanir mamma og babba**



**Góðu tit bæði, Sunnuvá og Dávur**
Hjartaliga tillukku við próvnum.
**Ynskja omma og abbi**



**Góða Selma-gumma**
Hjartaliga tillukku við degnum 4. apríl. Takk fyri, at tú ert so góð við meg og takk fyri nógvar góðar løtur saman. Eg elski teg.
**Heilsan Per**



**Góði Ísak**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 5. apríl.
**Ynskja mamma og babba**



**Hey góði piparsveinur**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 30 ára degnum. Pipar fært tú tá tú kemur til Føroyar, ha-ha!
**Heilsan vit í Stoffalág**



**Góða Beinta!**
Hjartaliga tillukku á 25 ára føðingardegnum 2. Páskadag. Poulina, sum fyllir í dag, fær eisini eina heilsan.
**Heilsan øll í húsinum**



Hjartaliga takki eg øllum, sum mintust meg á 85-ára degnum. Somuleiðis ynski eg øllum góðar páskir.
**Heilsan**
**Andrias Nielsen**
Sandavági



Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum, sum mintust meg á konfirmatiónsdegnum.
**Heilsan**
**Andrias Nielsen**
Sandavági



**Góða elskaða Silja**
Hjartaliga tillukku við 8 ára degum 6. apríl.
**Muss og klemm :o) frá mammu, beiggjunum, Katrinu (og Bessie)**



Tann 21. mars fekk Karin ein lítlabeigga úr India. Hann eitur Pravin, og er 1. ára gamal. Mamma og babba eita Anna Maria og Ingvi Ragnarsson.Vit vilja takka øllum foreldrum og vinum fyri alla hjálp.
**Heilsan familjan Ragnarsson, Klaksvík**

Øllum tykkum sum gjørdu hjúnabandsdag okkara hin 20. des. 2003 so minnisríkan og ógloymandi, vilja vit veita eina hjartans tøkk og ynskja tykkum einar gleðiligar páskir. Takk fyri alla góða hjálp, blómur, gávur og fjarrit.
**Ynskja Rannvá og Dávid**





Hjartaliga takka vit tykkum øllum, ið vóru við til at gera gullbrúdleypsdagin, 30. januar, á Svangaskarði, so hugnaligan og ógloymandi fyri okkum. Hjartans tøkk til tykkum mongu, ið sendu okkum blómur, gávur og fjarrit og tykkum, ið ringdu til okkum. Vit ynskja øllum einar gleðiligar páskir.
**Heilsan**
**Nelly og Piddi Olsen**
**Saltangará**



Øllum tykkum, sum við blómum, telegrammum og á annan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegnum tann 10. januar 2004, takka vit hjartaliga. Tykkum sum á ein hvønn hátt hjálptu til á okkara stóra degi, takka vit serliga.
**Heilsan**
**Erla, Christian og børnini**



**Góða Hanna**
Tillukku á konfirmatiónsdegnum.
**Heilsan vinkonan**